# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Stóra stríðið í Jesu líknilsum.
Kl. 11: Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag: kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11: Hámessa í Mariukirkjuni.
Sunnudag kl. 14: Sunnudagsskúli.

**Ebenezer**
Leygardagin kl. 16 er Eldrasamkoma. Øll eru vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Hebron, Argir**
22.-24. februar verður møtirøð í Argja skúla við barnafundi kl. 17 og evangel. fundi kl. 20. Leygarkvøldið sangcafé.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11: Møti.
Eingin sunnudagsskúli.
Kl. 17: Møti fyri alla familjuna, skótarnir skipa fyri. Juniorar úr Vági vitja. Drekkamunnur.
Mánadagin kl. 17 og 19: Skótamøtir.
Týsdagin kl. 20: Hornvenjing.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin 24. febr. kl. 15.00 í KFUK: Aðalfundur.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. Kids.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Mourits Mouritsen, Meinigheitskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti, kl. 20 venur Manskórið.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 21 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 19.30 Ársfundur.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Rúna Rasmussen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Týskvøldið kl. 20 Bøn fyri Havnini í Meinigheitini í Hoyvík, á Brekku 3, oman fyri MBM.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti – vitjan úr Saron í Vestmanna. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 11: Gudstænasta á Brekku 3, í Hoyvíkar skúla. Kl. 14: Sunnudagsskúli. Kl. 17.30: Bøn og kl. 18: Møti við Ungdómsbólkinum.
Týsdagin kl. 20: Tvørkirkjuligt tiltak á Brekku 3, Bøn fyri býnum, sýndur verður filmur hvussu veking kemur av bøn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**4. Grein skótar**
Eftir gudstænastuna 22. febr. kl. 19.00 fara vit niðan í KFUK. Onnur áhugað eru vælkomin.
Nevndin 4. Grein

**Saron, Vestmanna**
Leygardagin kl. 15 til 17: Bíbilseminar við Sam Jacobsen, evni: Efusarbrævið.
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti við Jón Miðberg.
Mánadagin kl. 20: Bíbil- og bønarmøti.
Telefonandaktin 424 741.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og møti kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30: Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi. Hjalgrím Davidsen luttekur.
Leygarkvøldið kl. 20: Opið hús við Jastrid Høj.
Sunnudagin kl. 17: Møti við Tummas Jacobsen. Barnamøti kl. 17.

**Lívsins Orð**
Barnamøti verður í dag kl. 17.15.
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við breyðbróting.
Mánadagin kl. 17 møta Liljurnar.

**Møti í kirkjuni í Mikladali**
Møti verður leygarkvøldið kl. 19.30, ung úr KFUM og K luttaka. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Leygarmorgunin kl. 10 Bøn.
Kl. 19 Alpha skeið, kl. 20.30 Opið hús. Ung úr Hoyvík vitna.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Ung úr Hoyvík vitna.
Mánakvøldið kl. 20 Bøn.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli. Kl. 17.30: Bøn og lovsangur. Kl. 18: Møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við talu og sangi.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.00. Øll eru hjartaliga.
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.00.
Einki møti sunnukvøldið vegna missiónsviku í Porkeri.

**Bygdarhúsið í Lopra**
Møti verður í kvøld kl. 20. Levi Joensen og aðrir tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn**
Gongutúrur til Miðdepil Føroya. Farið verður frá Kunningarstovuni sunnudagin kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og drekkamunn við. Tilmelding.

**Dagtilhaldið í Vági**
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 311391/261516.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Fríggjadagin 22. februar*
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Losjan í Havn**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
**Tín** stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundir verða í kvøld kl. 20–21.00 og kl. 22.30–23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Suðuroy**
**Javni.** Undir heitinum »Hvat kann geva lívsvirði« verður almennur fundur á Gistingarhúsinum í Øravík leygardagin 23. februar kl. 15.00. Óli Holm, mentamálaráðharri, Doris Hansen, form. í MBF, Annika Johannesen, stovnsleiðari, og Malena Arnholdsdóttir, næstform. í Javna, halda fyrilestur. Øll eru vælkomin.
Teldupostur:
javni@post.olivant.fo

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
*(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)*
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy.
Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Sinnisbati**
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið,*
*Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Heilafelagið, MBF-húsið**
*Íslandsvegur 10*
*tlf./fax 321520*
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyskt møti í Esbjerg**
Leygarkvøldið 23. febr. kl. 19.30 verður møti í Zionskirkens sognhus, har ung úr Århus luttaka.
*Nevndin fyri teimum føroysku møtunum í Esbjerg.*

**Føroyahúsið**
Leygarkvøldið 23. febr. kl. 19 skipar Kristnastova fyri Gospel Café í Føroyahúsinum. Á skránni verður tónleikur, sangur, vitnisburður v.m. Ókeypis te, kaffi og køkur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg, tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

## 70 ÁR

Í dag, 22. februar, verður Sonja Rasmussen á Strondum 70 ár. Føðingardagurin verður hildin í Pensionistahúsinum frá kl. 19.00.



# FILMSTEIGURIN



## Rat Race

Fyri at undirhalda sínum svøku ríku kenningum, skipar casino-ánarin, Donald Sinclair fyri eini kappkoyring, sum vil fáa sjálvt tær malandi roulettirnar í Las Vegast at blikna, fyri vinningin, sum er ein kassi við tveimum milliónum dollarum. Seks lið skulu royna at koma fyrst á mál, og hvør eina røring verður fylgd neyva av Sinclair og hansara ríku vinum, sum vedda um úrslitið. Reglurnar??? Tjaaa, tað eru ongar reglur!

## Domestic Disturbance

Frank vil tað besta fyri son sín. Eftir hann varð skildur frá konuni (Teri Polo) fyri tveimum árum síðani, hevur sonurin verið treiskur og logið nógv. Men Frank og Susan elska son teirra. tey skilja, at aftanfyri tað ágangandi ytra, er ein 11 ára gamal drongur, sum hevur brúk fyri umsorgan. Frank og Susan finna væl útav tí heila saman, og gera tað besta fyri at vera góð foreldur. Men tað broytist… Susan hevur funnið ein nýggjan mann, sum hon skal giftast við. Rick er tilflytari til tann lítla býin, men hevur longu markerað seg sum ein ríkur filantropur. Hann kann geva Danny ting, sum Frank, sum er bátabyggjari ikki kann. Frank verður øvundsjúkur, men má ásanna, at tey bæði foreldrini dagliga helst eru tað, Danny hevur tørv á. Áðrenn brúdleypið byrjar Danny at fortelja søgur um Rick. Søgur, sum verða meira og meira ræðandi. Frank fer í tvíningar. Hann trýr ikki soninum, sum er kendur fyri at lúgva, men samstundis er hann noyddur at halda, at Rick kanska ikki er tann, sum hann hevur sagt seg at vera...





## From Hell

Jack the Ripper er vorðin kallaður tabloid-miðlarinnar fyrsta stóra »stjørna« í 20. øld. Heystið 1888 drap hann fimm kvinnur upp á 10 vikur, á ein bonskan og andstyggiligan hátt, og hareftir hildu morðini uppat. Tað er ongantíð vorðið uppklárað, hvør hann var, men hugfloygdar teoriir og gitingar hava ikki vanta. Í filminum fylgja vit løgreglumanninum Abberline (Johnny Depp), meðan hann roynir at finna útav teimum blóðugu morðunum, og ein heilt nýggj teori verður send av bakkastokki um rætta samanhangi til morðini – ein samansvørjing, sum ígjøgnum eftirlitstænastuna og frímúraralógina hevur tráðir langt inn í enska kongahúsið.





**Frumsýning**
Fríggjadagin 22.02. kl. $19^{00}$ Fríggjadagin 22.02. kl. $21^{15}$
Leygardagin 23.02. kl. $19^{00}$ Leygardagin 23.02. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 24.02. kl. $18^{00}$ Sunnudagin 24.02. kl. $20^{15}$




**Frumsýning**
Fríggjadagin 22.02. kl. $20^{45}$ Leygardagin 23.02. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 24.02. kl. $20^{45}$

HAVNAR BIO
☆ Tlf. 31 19 56 ☆




**Frumsýning**
Fríggjadagin 22.02. kl. $23^{00}$ Leygardagin 23.02. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 24.02. kl. $22^{45}$




**Frumsýning**
Fríggjadagin 22.02. kl. $18^{45}$ Leygardagin 23.02. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 24.02. kl. $18^{45}$




Fríggjadagin 22.02. kl. $23^{30}$ Leygardagin 23.02. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 24.02. kl. $22^{30}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 22.02. kl. $16^{45}$ Leygardagin 23.02. kl. $16^{45}$
Sunnudagin 24.02. kl. $15^{45}$